## Birna sum borgarstjóri

Herfyri varð býráðssamgongan í Reykjavík umskipað, og ein av avleiðingunum er, at býurin skal skifta borgarstjóra næsta ár. Tá eigur Sjálfstæðisflokkurin borgarstjóran, og fáa veljararnir sín vilja, verður tað ein kvinna. Ein meiningakanning vísir, at 43 prosent av teimum spurdu vilja, at Birna Hanna Kristjánsdóttir verður borgarstjóri næsta ár. Av teimum, sum valdu Sjálfstæðisflokkin seinast, vilja meiri enn 50 prosent hava Birnu til borgarstjóra.



## Gevast at fiska lodnu

Íslendsku lodnuskipini skuldu ætlandi fáa boð í dag um at gevast við at fiska lodnu fyribils. Orsøkin er, at skipini hava bara fingið smá 30.000 tons, og tað er langt niðan fyri markið upp á 400.000, sum Havrannsóknarstovnurin metir sum minstamark fyri, at gýtingin kann metast at vera trygg. Sambært íslendskum fjølmiðlum er lodnuveiðan í vetur tann minsta síðani 1983, og tað kemur fleiri reiðaríum sera illa við, skrivar Morgunblaðið.

# - Vit eru líka góð við flaka

**Tá ið ætlanin var at tøma flakavirkið í Skopun fyri maskinur og annan útbúnað undir kreppuni í nítiárunum, søgdu skopuningar kortanei. – Fólk vardu virkið, sum tey høvdu bygt og vóru góð við – og vunnu slagið, segði Gerghard Lognberg á móttøkuni mánadagin**



*Millum mongu gestirnar mánadagin vóru báðir løgtingsmenninir í oynni, Gerhard Lognberg og Páll á Reynatúgvu*

Mynd: Álvur Haraldsen




VINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Millum tey mongu, sum høvdu orðið við móttøkuna í Skopun mánadagin, tá ið virkið hátíðarhelt 40 ára stovningardagin, var Gerhard Lognberg, borgarstjóri í Skopun og løgtingsmaður.

Hann greiddi í stuttum frá gongdini í fiskiskipaflotanum um tað mundið, tá ið virkið í Skopun læt upp.

- Fyrst í sekstiárunum komu línubátarnir, og tá kom eisini broyting í á landi. Nú fóru menn at vera burtur alt árið. Teir høvdu ikki møguleika at ferðast til hús millum túrar og tóku tí familjuna á størri pláss at búgva. Avleiðingin var, at færri fólk sótu eftir á smáplássunum.

Borgarstjórin vísti á, at hesi árini sigldu skipini á bretska marknaðin við feska fiskinum, men fingu lítið burtur úr.

- Tað var saltfiskurin, sum gav peningin til breyð á borðið, legði hann aftrat.

Gerhard segði, at í eini bygd sum Skopun var einki lønandi arbeiði fyri kvinnurnar. Kortini høvdu hesar mammur og konur nóg mikið at gera við at passa hús og børn.

- Tá vóru hvørki barnagarðar ella pedagogar uppfunnir, sum hann tók til.

### Vend kom í

Gerhard vísti á, at so hvørt, sum sekstiárini gingu, hildu menn og kvinnur, at her mátti vend koma í.

- Vit høvdu útróðrarfelag í bygdini, og tvey feløg vóru, sum keyptu útróðrarfisk. Partarnir fóru nú undir at fyrireika bygging av einum flakavirki, sum hevur verið eitt stórt tak tá í tíðini.

Hann segði, at byggingin av virkinum byrjaði í 1966, og tað var Hannis Jensen, sum stóð fyri hesum arbeiði. Í februar 1968 stóð so flakavirkið í Skopun liðugt.

- Eg trúgvi, at hetta var størsta broytingartíð fyri Sandoynna – og ikki minst Skopun. Menn keyptu sær størri útróðrarbátar; í byrjanini vóru teir Sjóam og Fiskaklettur, og síðan kom ein røð av stórum bátum til bygdar.

Gerhard segði, at egningarskúrarnir, sum eisini komu um hetta mundið, vóru róptir "universitetini" á bygd.

- Latið okkum ongantíð gloyma tær kvinnur og teir menn, sum løgdu lunnar undir hesa oyggj – og hesa bygd, segði hann.

### Tíðir broytast

Borgarstjórin og løgtingsmaðurin ásannaði, at tíðirnar eru broyttar hesi 40 árini, síðan lunnar vórðu lagdir undir hetta vinnuliga virksemi í bygdini.

Hann greiddi í stuttum frá, hvussu gingist hevði virkinum upp í gjøgnum árini.

# Skúlanæmingar hjálpa til á virkinum í Skopun

**- Í dag eru vit væl mannaði við reinskeriborðini, tí skúlin hevur frí í dag og í morgin. Vit hava einar 8-10 skúlanæmingar aftrat teimum, sum vanliga eru til arbeiðis á virkinum, sigur Martin Olsen, virkisleiðari**

VINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mánadagin, tá ið Sosialurin var til móttøku á flakavirkinum í Skopun, vóru fólk til arbeiðis í framleiðsluhallunum allan dagin. Virkið hevði keypt umleið 120.000 pund av upsa frá Kolumbusi, og tað var hesin fiskurin, sum fór gjøgnum maskinurnar og kom inn á reinskeriborðini hendan dagin.

Vit vóru ein túr niðri á gólvinum hjá Martini Olsen, virkisleiðara og hansara dugnaligu fólkum, sum so trúføst stóðu á sínum plássum, meðan fólk lýddu á røður uppi í matarhøllini.

- Í dag eru vit væl mannaði við reinskeriborðini, tí skúlin hevur frí í dag og í morgin. Vit hava einar 8-10 skúlanæmingar aftrat teimum, sum vanliga eru til arbeiðis á virkinum.

Á Sandoy Seafood í Skopun hevur serliga verið tørvur á reinskerarum, tá ið mest er at gera á virkinum.

- Vit hava pláss fyri tilsamans 36 reinskerarum og minsta talið av fólki, sum vit mugu hava við reinskeriborðini, er 20. Kortini liggur talið nógvar dagar millum 16 og 20, og tað er ógvuliga tepurt.

Á virkinum í Skopun eru fýra flakalinjur, tvær bader 189 og tvær bader 184.

- Vanliga koyra vit við tveimum linjur í senn, men í dag, nú vit eru væl mannaði, koyra vit við trimum linjum.

Martin sigur, at koyrdu allar maskinurnar, og fiskurin var hampiligur til støddar, hevði rættiliga staðið á frystingini.

- Men teir dagar, tá ið stendur á frystingini, gongur framleiðslan eisini væl, leggur hann aftrat.

Nýggja reinskerilinjan á virkinum í Skopun er rættiliga nútímans, og hon er ein hin mest framkomna í Føroyum. At reinskerar kunnu sita og skera, er ikki nýtt, men við hvørt pláss er ein skermur, har reinskerar kunnu síggja, hvussu gongur.

- Tey síggja, hvussu nógv tey skera sjálvi, og tey síggja eisini, hvussu stórt miðaltalið fyri hvønn reinskerara er. Vit kunnu